Føroyar gerast limur í IMO

TRYGD Á SJÓNUM
Áki Bertholdsen

Nú er ætlanin at at føroyarskulu gerast sjálvstø›ugir limir í altjó›a felagsskapinum IMO.

Hetta er felagsskapurin, sum ásetur altjó›a trygdarkrøvini til skip.

Trygdarvi›urskiftini til skip eru nevniliga í tveimum. Eitt eru krøvini, sum hvørt land sær hevur fyri síni egnu skip. Men harafturat eru ta› tey altjó›a krøvini, sum IMO ásetir.

Sum ta› sæst a›rasta›ni í bla›num, er ta› nú ætlanin at yvirtaka málsøki› "trygd á sjónum" yvir á føroyskar hendur.

Jørgen Niclasen, landsst‡risma›ur í fiskivinnumálum, sigur, at samstundis, sum vit yvirtaka hetta málsøki›, er ta› ætlanin at gera Føroyar til "assosiera›an" lim í IMO.

– Hetta er eitt slag av limaskapi, sum gevur okkum talurætt í IMO, men ikki atkvø›urætt. Og samstundis skulu vit sjálvandi ganga undir teirra treytir.

Landsst‡risma›urin sigur, at yvirtaka vit bara málsøki› "trygd á sjónum", uttan at tengja IMO uppí, koma vit í eina løgna stø›u, sum vit ikki eiga at koma í.

– Tá ver›a ta› vit, sum taka avger›irnar og umsita reglarnar, men ta› ver›a danir, sum hava ábyrgdina.Og sostatt ver›a ta› eisini danir, sum fara at fáa átalu frá IMO, um vit ikki lúka treytirnar.

– Ta› haldi eg ikki er rætt. Eg haldi, at ta› hevur t‡dning at avger›ir og ábyrgd fylgjast og tí er ta› eisini rætt, at vit fáa okkara egna limaskap í IMO, sigur Jørgen Niclasen.

Ta› kemur ikki upp á tal at slaka

Í farnu viku samtykti Landsst‡ri› at Skipas‡ni› og onnur mál, sum hava vi› trygd á sjónum, skulu yvirtakast frá dønum. Men ta› kemur ikki uppá tal at slaka í krøvunum, sigur Jørgen Niclasen, landsst‡risma›ur

TRYGD Á SJÓNUM
Áki Bertholdsen

Nú er rættilig gongd komin á arbei›i› at yvirtaka málsøki› "trygd á sjónum" frá donskum myndugleikum, yvir á føroyskar hendur.

Málsøki› "trygd á sjónum" umfatar bæ›i Skipas‡ni›, merkingar, vitatænastuna, ve›urtænastuna og onnur vi›urskifti.

Máli› er nú komi› so langt, at landsst‡ri› samtykti í farnu viku at leggja uppskot fyri tingi› um at yvirtaka málsøki› frá donskum myndugleikum.

Jørgen Niclasen, landsst‡risma›ur í fiskivinnumálum, sigur, at uppskoti› bori› ni›an í tingi› fyrsta dagin.

Landsst‡risma›urin dylir ikki fyri, at hann er spentur uppá vi›ger›ina í tinginum

– Vónandi fer vi›ger›in í tinginum at geva okkum grei›ar ábendingar um, hvønn veg, og hvussu langt, vit skulu fara á hesum øki.

Jørgen Niclasen sigur, at ta› fer at kosta 18 milliónir um ári› at yvirtaka málsøki› "trygd á sjónum". Skulu vit yvirtaka Skipas‡ni› einsamalt, fer ta› at kosta 10 milliónir. Men endamáli› hjá honun er, at alt málsøki›skal yvirtakast.

- Tá i› Løgtingi› hevur sagt sína hugsan um máli›, ver›a samrá›ingar vi› donsku stjórnina. Tá i› tær eru lidnar, ver›ur uppskot aftur lagt fyri Løgtingi› um tær ítøkiligu lógirnar.

Hann sigur, at hetta fer uttan at taka tí›. Men hann ivast ikki í, at tá i› hetta valskei›i› er li›ugt, skuldi øll vi›urskifti, sum hava vi› trygd á sjónum, veri› komin á føroyskar hendur.

Trygdin í hásæti

Jørgen Niclasen sigur, at ta›, sum er mest umrá›andi fyri hann, er, at trygdin ver›ur sett í hásæti.

– Endamáli› er at var›veita trygdina

– Men trivna›urin skal avgjørt heldur ikki undirmetast, tí hann hevur eisini ómetaligan t‡dning, um ta› yvirhøvur skal eydnast at fáa fólk umbor›. Ikki minst nú kappingin frá ø›rum vinnugreinum er vi› at ver›a ein hóttan ímóti flotanum, eri eg sannførdur um, at ta› hevur alstóran t‡dning, at vit eisini hugsa um trivna›in umbor› á skipunum. Annars kann ta› ver›a so skjótt, at fólk ikki fæst til skips.

At vit seta trygdina og trivna›in í hásæti, haldiu eg, at n‡ggja vaktarskipi› er eitt gott dømi um, sigur Jørgen Niclasen. Her er hann avmynda›ur í føroyskum klæ›um á brúnni á Brimli í samrø›u vi› Kaj Mortensen, fiskivinnustjóra, vm. og Christian Andreasen, sakførara

– Men at vit seta trygdina og trivna›in høgt, haldi eg, at n‡ggja vaktarskipi› er eitt talandi dømi um, tí har hava vit skori› út í korti›, hvussu vit halda, at vi›urskiftini skulu vera.

Ikki uppá tal at slaka

Óndar tungur hava vilja› veri› vi›, at einasta orsøkin til, at vit nú skulu yvirtaka Skipas‡ni›, er, at so kunnu vit sleppa at slaka krøvini til trygdina fyri at sleppa rei›arum undan ymsum útrei›slum?

– Ta› kemur ikki uppá tal.Trygdin skal setast í hásæti og ta› liggur ómetaliga fjart frá mær at slaka treytirnar. Slíkum hugsunarhátti er tí›in farin frá. Ein siglandi tjó› sum føroyingar, kann ikki loyva sær at seta at trygdina til viks. Ta› má ikki henda, at spurnartekin ver›ur sett vi›, at at vit ikki gera okkara besta fyri trygdina á sjónum

Tey, sum eisini halda, at eitt av endamálinum vi› hesum er, at Føroyar skulu ver›a eitt frísta› fyri skip, sum ikki kunnu skrásetast a›rasta›ni, fara ógvuliga skeiv, sigur Jørgen Niclasen.

Krevja umbering frá Jørgen Niclasen

- Hann fer langt út um mark tá i› hann sigur, at vit seta trygdina á sjónum í vanda, sigur forma›urin í Starvsmannafelagnum

FAKFELAGSMÁL
Áki Bertholdsen

– Jørgen Niclasen eigur at koma vi› eini umbering. Vit halda, at hetta er so langt úti, at vit vilja ikki finna okkum í hesum.

Gunnleivur Dalsgar›, forma›ur í Starvsmannafelagnum er í ø›ini inn á Jørgen Niclasen, fiskimálará›harra.

Í Sosialinum leygardagin høvdu vit bi›i› fiskimálará›harran um eina vi›merking til ósemjuna, sum nú hevur ført vi› sær, at n‡ggja Vaktarskipi› hevur ligi› vi› bryggju í Noregi í meiri enn tvær vikur, uttan at sleppa í sigling.

Fiskimálará›harrin helt, at fakfeløgini vóru órímiligt, tá i› tey kravdu 30-40% í læønarhæking í einum.

Men ta›, sum serliga er falli› formanninum í Starvsmannafelagnum fyri brósti›, er, at Jørgen Niclasen samstundis helt, at hetta var at seta trygdina á sjónum upp á spæl, tí so leingi Brimil ikki sleppur at sigla, koma vit at mangla eitt skip, um naka› skuldi borist á.

– Vi› hesum or›unum gevur hann fakfeløgunum skyldina fyri, at ta› ikki enn hevur bori› til at fáa semju um lønirnar hjá manningini á Brimli.

– Og samstundis er hetta at geva fakfeløgunum skyldina fyri, at vit ikki eru nógv væl fyri at fara undir eitt bjargingararbei›i, sum naka› skuldi borist á.

Gunnleivur Dalsgar› heldur, at hetta er ómetaliga langt úti.

– Eg kann bara svara fyri Starvsmannafelagi›. Og eftir okkara tykki eru hetta so grovar skuldsetingar, at vit eiga at fáa eina umbering frá landsst‡rismanninum, tí hesum finna vit okkum rætt og slætt ikki í, sigur forma›urin.

Hann sigur, at Starvsmannafelagi› er í eini samrá›ing sambært teirri avtalu, sum longu er í sáttmálanum, men at tær samrá›ingarnar eru ikki lidnar enn.

– Men ta› eru tveir partar í eini samrá›ing og ta› áliggur ikki bara tí eina partinum at finna eina semju.

Gunnleivur Dalsgar› sigur, at Jørgen Niclasen kundi einsvæl vent sær til starvsfelaga›an hjá sær, s, Karsten Hansen, sum førir samrá›ingarnar fyri landsst‡ri›, og álagt honum at syrgt fyri at samrá›ingarnar førdu til eitt úrslit.

– Eg kann aldrin trúgva, at ta› so vatntætt skott ímillum teir ymsu partarnar í landsst‡rinum, at landsst‡rismenninir ikki tosa saman. Og tá i› Jørgen Niclasen hevur ábyrgdina av Brimli, áttti hann eisini at tiki› ítøkilig stig til at loysa ósemjuna, heldur enn at koma vi› so einvísum og grovum skuldsetingum ímóti fakfeløgunum, sum ta› her er talan um, sigur Gunnleivur Dalsgar›.

Hann vísir á, at Starvsmannafelagi› hevur altí› víst ábyrgd. Hann minnir m.a. á, at tá í verkfall var á vári í fjør, var Vaktar-og Bjargingarfelagi› undantiki›, tí várrró›urin var fyri og vit hildu, at ta› var ábyrgdarleyst at leggja Tjaldri› lami›.

Stór umbygging í Vík

Felagshúsi› hjá Haldarsvíkar Avhaldsfelag ver›ur bygt um, so ta› ikki ver›ur at kenna aftur

BYGDARTÍ‹INDI
Edvard Joensen

Avhaldshúsi› í Vík skiftir útsjónd, nú ta› ver›ur umbygt

Mynd: Edvard Joensen

Haldarsvík: Avhaldshúsi› í Vík, sum er 65 ára gamalt og ikki tí›arhóskandi, ver›ur nú umvælt frá grundini, so víkarfólk fáa eitt spildurn‡tt felagshús, tá arbei›i› er li›ugt.

Felagshúsi› hjá Haldarsvíkar Avhaldsfelag var› tiki› í brúk í januar 1935. Ta› var› bygt vi› tí tilfari, sum tá var at fáa, og eitt nú bjálving var› als ikki hugsa› um.

Paulivar Johansen, forma›ur í Haldarsvíkar Avhaldsfelag, sigur, at í dag var stø›an vor›in tann, at ta› var› alt ov d‡rt at hita húsi›. Oljan fór beinlei›is út í luftina, og ta› bar ikki til.

Tí var› fari› undir hesa stóru umvælingina, sum í høvu›sheitinum fatar um bjálving innan, n‡ggj vindeygu og n‡ggjan klædning uttan. So tá li›ugt er, sigur Paulivar Johansen, ver›ur húsi› fullkomiliga broytt.

Avhaldshúsi› er einasta samkomuhús, sum er í Vik, og ta› ver›ur dúgliga brúkt, sigur Paulivar Johansen. Har ver›a øll tiltøk í bygdini hildin. Alt frá dansi til sunnudagsskúla og kristilig møti.

– Ta› er eisini komi› fyri, sigur forma›urin, at lík er bori› út úr Avhaldshúsinum. Ta› var ein gamal ma›ur, sum doy›i, me›an kirkjan var› umvæld. Hann hev›i sína tí› veri› trúgvur limur í Avhaldsfelagnum, so hann fór til gravar frá sínum egna, um til ber at siga so.

Paulivar Johansen sigur, at høvu›sorsøkin til umvælingina nú, sum sagt var tann stóra oljun‡tslan. Millum útveggirnar og paneli› er einki. Í erva er ein takpláta millum hallarhválvi› og himmalhválvi›, so har var ikki so nógv anna› at gera.

Í fyrsta umfari› er valt at taka ovaru hæddina. Veggirnir eru tiknir ni›ur, og vindeyguni eru skift. Nógv vindeygu vóru eisini, og øll høvdu tey einkultar rútar, so har var heldur eingin bjálving í. Nú eru færri vindeygu sett í, samstundis, sum bjálva› ver›ur, og klædningurin skiftur uttan. Klædningur og vindeygu eru úr plastikki, sigur forma›urin. Boga›a hválvi› ver›ur nú at síggja um alla høllina. Tá húsi› var› longt í 1966, var› n‡ggja lofti› gjørt slætt, sigur forma›urin. Men ta› sær einki vakurt út, so nú skal »ordiligt« loft gerast um allan salin.

Í ni›aru høllini, har dansa› plagar at vera, ver›ur bara ni›ara sí›a tikin í fyrsta umfari. Ta› kemst av, at har eru vindeyguni, og so kundi ta› sama alt gerast bara beinanveg. Restin ver›ur so gjørt, tá ovara hæddin er li›ug, ella beinanveg, fíggjarligur møguleikarnir eru.

Ikki tí, sigur Paulivar Johansen, forma›ur í Haldarsvíkar Avhaldsfelag. Tilfari› var í sera gó›um standi. Ta› sást ikki rot á økrum spreki. Men sum rímiligt er, vóru slitmerki á. Eisini skal øll el-installatiónin skiftast. Ikki tí, at ta› beinlei›is var ney›ugt, sigur forma›urin. Men meira tí, at so kann sleppast undan at koma aftur um aftur, tí talan er jú um gamla innlegging, sum eisini kann fara.

Arbei›i› vi› at taka ni›ur, ver›ur gjørt sjálvbo›i›, me›an fakfólk er til at gera aftur. Klæ›a og bjálva. Arbeitt er solei›is, at tiki› er ni›ur, so smi›urin kann bjálva innan, tá ve›ur ikki er at arbei›a úti. Ætlanin er, at arbei›i› skal vera li›ugt til jólar.

Ta› kostar sjálvandi naka› væl at gera eina slíka umbygging. Hvussu nógv hevur forma›urin ikki nágreiniligt tal fyri beint í løtuni. Men felagi› eigur naka› av pengum. Stu›larnir hava veri› gó›ir, og tey ætla at arbei›i› skal gerast li›ugt, helst uttan at taka lán.

Sum dømi um, hvussu gó›an stu›ul húsi› fær í sókníni, nevnir forma›urin, at í summar var basarur í Vík. Inntøkan var umlei› 150.000,- krónur, og bara 10% fóru av aftur til útrei›slur. Til dømis fekk felagi› 13 lomb fyri einki at luta burtur. Hann nevnir eisini, at í grannabygini Tjørnuvík, sum eisini hevur egi› bygdarhús, var so vítt hann veit hvørt einasta hús, sum stu›la›i Avhaldshúsinum í Vík vi› gávum.

Húsi› ver›ur nógv broytt, og ta› eru tey sum halda, at gamli hugnin vi› húsinum ver›ur burtur. Men ta› eru fólk, sum ikki búgva í Vík meira, sigur forma›urin. Nostalgi nevna vit ta›. Í Vík er eingin, sum ikki fegnast um ta›, sum nú ver›ur gjørt.

Onkur spísk vi›merking er tó. Hendan dagin, Sosialurin vitja› í Avhaldshúsinum, helt ein víkarma›ur, sum komin var inn á gólvi›, me›an smi›urin bjálva›i, at: »Nú missir Shell ein gó›an kunda.«